**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0684**
**Tíðarskeið 9/11-15/11-2006**

---

**Fólk frá FRS.:** Arnold Henriksen, Helke Hoyer og Regin Kristiansen.
Frá 11-13/11: Hjálmar Hátún og William V. Fredericks (ein amerikanari).

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, termistorketan og tríggir havsvívarar..

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 9/11 kl.2115. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir. Orsakað av veðri, fóru vit bert norður á 64°N
Frá skurði N sigldu vit inn á Havnina, eftir Hjálmari Hátún og Williami Fredericks, sum komu umborð við trimum havsvívarum. Av Havnini varð siglt vestur í Bankarennuna, har havsvívararnir vórðu settir út í øllum góðum. Síðani tóku vit eina CTD støð.
Siglt varð so vestur á støð V19 á skurði V. Vit tóku so skurðin av Bankanum og inn á Landgrunnin.
Tá hesin skurðurin var liðugur, sigldu vit inn á Havnina við Hjálmari og Williami og settu teir av.
Av Havnini varð farið á skurð S og tóku vit hendan skurðin av Munkagrunninum og móti Hetlandi.
Siglt varð so norður á støð E8 og tóku vit hendan skurðin frá markinum og inn ímóti Nólsoynni.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekst væl, hóast veðrið var stak vánaligt hendan túrin.
Vit vóru aftur á Havnini mikudagin 15/11 kl. 1000.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 49 støðir og saltprøvar á 49.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vetur.

**Viðmerkingar:** Veirurin varð skoyttur einaferð á túrinum.

16-11-2006 ________________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 0684